## Hugburðurin lá eftir

**TB veteranurin og liðformaðurin staðfesti, at teir í Klaksvík ikki høvdu víst tað, sum higartil hevur borið góð úrslit við sær**

TB
*Jóannes Hansen*

Ein tann royndasti fótbóltsspælarin í Føroyum er TB liðformaðurin og liðformaðurin á landsliðnum, Óli Johannesen. Hjá honum var skjótt at staðfesta eftir stórtapið í Klaksvík, at hetta hevði á ongan hátt verið teirra dagur:

- Vit høvdu als ikki tann hugburðin, sum vit higartil hava havt, og so kundi tað ikki ganga. KÍ var ágrýtið, og teir spældu fínan fótbólt, og tá ið teir so beinanvegin fingu hol á, so gjørdist mótbrekkan eyka tung, so har var einki at gera, staðfesti Óli Johannesen eftir dystarlok í Útvarpi Føroya.

Nú fyrireikar TB seg til nýggjan klassikara, tá ið HB komandi sunnudag fer at vitja á Tvøroyri. Næstsíðsta sunnudag vann TB 3-0 á heimavølli móti GÍ. Onkur kundi kanska sagt, at avrikið í Klaksvík kundi bent á, at armarnir ikki vóru komnir niður aftur síðani tann trivaliga sigurin. Úrslitið kundi bent á tað, og eingin veit betri enn teir í TB sjálvir, at tað verður neyðugt við hugburðinum frá GÍ dystinum, um nakað skal fáast burturúr ímóti meistaraliðnum.

# Í Klaksvík gongur tað sum eftir ánni

**Klaksvíkingar fingu orduliga luft undir veingirnar, tá ið tað beinanvegin eydnaðist at fáa mál og harvið at punktera fyritreytirnar hjá TB, sum ikki var at kenna aftur sammett við nógvu tær undanfarnu ferðirnar**

KÍ-TB
*Jóannes Hansen*



Barometrið hevur gingið skjótt seinastu dagarnar í Klaksvík. Eftir trivaliga sigurin í Fuglafirði 2. hvítusunnudag varð staðfest, at nú var gloppið til botnin vorðið størri. Og eftir stórsigurin á heimavølli móti TB er tað ikki frítt, at tað verður hugt upp-eftir og fremeftir. Fjarstøðan til toppin er eftir tíggju tey fyrstu av 27 umførum fimm stig!

Klaksvíkingar løgdu fyri sum óløgi, og tað tørnaði soleiðis út, sum teir høvdu droymt um, at tað skuldi gera, og sum gestirnir av Tvøroyri fyri alt í verðini høvdu viljað sloppið undan.

Tvørámenn vóru skerdir skerdir í framrættaða partinum. Emmanuel Larby var ikki førur fyri at spæla, og teirra royndir móti málinum hjá Karstini Joensen kundu teljast á aðrari hondini. Allan Poulsen sendi eina ferð í tvørtræið, og eina ferð sendi hann úr góðari støðu framvið málinum. Burtursæð frá málinum, sum Aca við høvdinum skoraði, tá ið hann stýrdi frísparksinnleggi frá Jón Johannesen í kassan og minkaði um munin til 3-1, so var hetta tað í 1. hálvleiki, og eftir steðgin var TB so at siga ikki í KÍ brotsteiginum.

Klokkan vísti 1.06, tá ið Atli Danielsen úr tveimum metrum hevði sett krúllin undir hornasparksinnlegg frá Heðini á Lakjuni. So var heimaliðið omaná, og tað var neyðugt hjá TB fullkomuliga at saðla um. Setningurin hjá teimum var at halda tørn um málleysa javnleikin so leingi, sum tað bar til. Tíðin var frá fyrsta bríksli í teirra parti. Men bara inntil KÍ hevði fingið fyrsta málið. So var tað heimaliðið, sum var omaná og kundi bíða eftir TB.

Fyrsta málið gav KÍ luft undir veingirnar. Hugburðurin hjá teimum tóktist nógv meiri sannførandi, enn hann var hjá mótstøðumonnunum. Klaksvíkingar vunnu flestu nærdystirnar, og teir vóru fyri á returbóltunum, og fyri tað mesta runnu TBarnir aftaná mótstøðumonnunum, sum arbeiddu nógv og fluttu seg væl og megnaðu at varðveita nógv fólk frammarlaga á vøllinum.

### Heðin í hopla

Klaksvíkingar hava lagt um til 4-3-3. Tað snýr seg eitt nú um at toga spælið í borðini, og tað snýr seg um at gagnnýta stóru ferðina, sum Heðin á Lakjuni kann hava í vinstra borði, og sum Arnhold Joensen kann hava í høgra borði. Tað eydnaðist í hvussu so er fyri ein part ímóti TB, sum varð sett skákmát við tennisúrslitinum 6-1.

Men tað vóru fyrst og fremst deyðbóltarnir og misskiljingar í TB verjuni, sum bóru trivaligu úrtøkuna við sær. Og tað var merkisvert, tí miðverjarnir hjá TB, Óli Johannesen og Aca Petrovic, plaga saman við stinna málverjanum, Predrag Markovic, at eiga brotsteigin frammanfyri TB málið. Men tað gjørdu teir ikki hesa ferð, og teimum eydnaðist heldur ikki hesa ferð, soleiðis sum tvørámenn hava megnað undanfarnu ferðirnar, at byrgja uppfyri innleggjum úr borðunum.

2-0 stóðst av misskiljing millum TB miðverjarnar og málverjan. Ovi Nysted sneiddi seg púra leysan og kundi trilla bóltin í tóma málið.

Heðin á Lakjuni var millum teir eyðsýndu. Hann legði upp til fyrsta málið, hann skoraði triðja málið við høvdinum, eftir at Arnhold Joensen hevði lagt horna innfyri úr vinstru, og so skoraði hann tey bæði síðstu málini. Tað fyrra setti hann fótin undir, eftir at Ovi Nysted hevði lagt flatt innfyri úr høgru, og tað seinna stútaði hann, eftir at Leon Bjartalíð, sum síðstu løtuna treivst betri á høgra vongverja, enn hann hevði gjørt í hinum borðinum, hevði lagt innfyri.

Unglingaspælarin Kristoffur Jacobsen skoraði fjórða KÍ málið. Úr høgru sneiddi hann framvið fleiri, áðrenn hann steðgaði á, bjóðaði av mitt fyri og legði so bóltin framvið málverjanum. Sera sannførandi og avbera gott lag á og kring vøllin í Klaksvík.

### Løgdu kongin

TB ætlaði sær somu útgangsstøðu, sum nógvu tær seinastu ferðirnar hevur borið góð avrik og stóra úrtøku við sær. Tá ið teir høvdu fingið fyrsta bakkaluðaran, royndu teir at svara aftur, og hóast teir vóru spældir sundur og saman, so megnaðu teir fyrsta tíman at halda KÍ niðri á 2-0, og Aca skoraði til 3-1, tá ið tað restaðu tjúgu minuttir.

Síðsta stóra korterið skrædnaði orduliga hjá TB, og 6-1 tapið er tað størsta, sum teir higartil hava lagt rygg til. Tað var merkisverda stórt, tá ið havt verður í huga, at tað í fimm teimum undanfarnu royndunum bara var farið eitt mál ígjøgnum hjá teimum (0-1 í Fuglafirði), og at teir 8. mai spældu málleysan javnleik móti KÍ.

### FAKTA

**KÍ-TB 6-1 (2-0)**
1-0: Atli Danielsen 2.
2-0: Ovi Nysted 24.
3-0: Heðin á Lakjuni 61.
3-1: Aca Petrovic 71.
4-1: Kristoffur Jacobsen 73.
5-1: Heðin á Lakjuni 75.
6-1: Heðin á Lakjuni 88.
**Dómari:** Birgir Sondum
**KÍ:** Karstin Joensen - Kristoffur Jacobsen, Jan Andreasen, Niclas Niclassen, Leon Bjartalíð - Atli Danielsen, Hjalgrím Elttør (Allan Joensen, 75.), Høgni Madsen (Sigmund Jacobsen, 78.) - Arnhold Joensen, Ovi Nysted (Erling Fles, 78.), Heðin á Lakjuni
**Gult kort:** einki
**TB:** Predrag Markovic - Predrag Zivkovic, Aca Petrovic, Óli Johannesen, Jón Johannesen - Einar Petersen, Birgir Rasmussen (Mortan Enni, 70.), Bárður Dimon, Búi Mortensen (Alexander Jovevic, 55.) - Allan Poulsen (Pætur Holm, 64.), Olivur Abrahamsen
**Gult kort:** einki

# Forboð fyri at sparka

**Tá ið tú ofta hevur bóltin økist sjálvsálitið, heldur væl nøgdi KÍ liðformaðurin, sum eisini fegnast um, at ein av veteranunum er um at koma fyri seg**

KÍ
*Jóannes Hansen*

Atli Danielsen hevur higartil í ár ofta verið noyddur at svara spurningum, sum hava gingið upp á vánaligu avrikini og soltnu úrtøkuna hjá KÍ. Nú lá betri fyri, og sjálvandi er KÍ liðformaðurin fegin:

- Eg haldi ikki, at TB hevði ein góðan dag. Vit kvíddu fyri, at tað skuldi ganga, sum tað so ofta hevur gjørt, tá ið vit hava havt nógv trýst, men ikki hava megnað at skora mál, og tað so er komin panikkur í okkum. Tí hevði tað alstóran týdning fyri okkum, at vit skoraðu beinanvegin, og harvið at beinini vórðu tikin undan teirra taktikki.

*Hví vinna tit so nógv?*

- Bæði tí teir ikki eru so tættir, sum teir hava verið, men eisini tí vit spæla væl, og tí vit hava nógv størri úrtøku burturúr møguleikunum, enn vit hava havt. Hjá okkum á miðvøllinum hevur tað stóran týdning fyri sjálvsálitið, at vit ofta hava bóltin. Oddbjørn hevur mest sum givið okkum forboð fyri at sparka langt. Hann vil hava okkum at spæla, og tað kemur væl við á miðvøllinum.

Tá ið eitt korter var eftir, varð Allan Joensen, sum í mong ár hevur verið millum stinnastu KÍ spælararnar, settur á vøllin. Erling Fles kom eisini inn, og so blaðungi og vinstrabeinti Sigmund Jacobsen, sum eisini varð settur inn í Fuglafirði, og sum sær út til at hava góð evni.

- Teir stóðu seg allir væl, og tað er fínt, at vit hava fleiri, sum kunnu spæla. Allan Joensen hevur verið nógv skaddur í hælsinuni. Nú hevur hann leingi vant við okkum. Hann ansar eftir sær, men tað hevur gingist honum væl, og vit hava heilt víst brúk fyri honum, heldur væl nøgdi KÍ liðformaðurin, sum sigur seg vera farnan at hugsa um torføru avbjóðingina á Eiði næsta sunnudag.

- Teir vunnu á okkum í Klaksvík, og vit vita, at tað verður torført. Men um vit varðveita hugburðin og góða spælið, so haldi eg, at vit avgjørt hava møguleikan.